TILTØK

Gudstænastur
18. sunnudag eftir Trinitatis
Vesturkirkjan: kl. 11, altarg., Heri Joensen
Argir: kl. 11, altarg., Bergur D. Joensen
Havnar kirkja: kl. 11, altarg., skriftamál kl. 10.40, Sonja Klein og Elsa Funding
Vestmanna: kl. 12, altarg., Inga P. Dam. (Innsavning verður til sunnudagsskúlan hjá Kirkjuligu Heimamissiónini)
Sandavágur: kl. 12, altarg., David Johannesen. (Broytt kirkjutíð: Komandi sunnudag 22. okt. verður farið í kirkju kl. 12 í Sandavági, Miðvági, Sørvági og Bø)
Fuglafjørður: kl. 12, familjugudstænasta
Funningsfjørður: kl. 16, altarg., Uni Næs
Sjóvar kirkja: kl. 12, altarg., Jógvan Fríðriksson
Hósvík: kl. 12, Marjun Bæk
Hvalvík: kl. 12, Martin R. Jacobsen
Christianskirkjan: kl. 11, Niels Pauli Danielsen
Viðareiði: kl. 12, altarg., Hans Eiler Hammer
Klaksvíkar Sjúkrahús: kl. 10,
Norðoya Røktarheim: kl. 14.30, Jóhann Henriksen
Gøta: altarg., Jónsvein Bech
Gjógv: kl. 12 messa,
Eiði: kl. 17, Emil Olsen
Tvøroyri: altarg., Petur M. Rasmussen
Leiti: kl. 11,
Hov: kl. 12.15, Ólavur Rasmussen
Dalur: kl. 12, Eva Brinck Jensen
Broytt kirkjutíð: Farið verður í kirkju í Selatrað kl. 12.00)

Ebenezer
Sunnudagin kl. 12 sunnudagsskúli, kl. 18 evan-geliskt møti, kl. 21 útimøti. Mánadagin kl. 20 bønarmøti.

Hvítusunnusamkoma Yviri við Strond
Sunnudagin kl. 11 morgun-møti, kl. 18 evangeliskt møti.
Øll eru vælkomin.

Filadelfia, Landavegur 22
Í dag kl. 17 landsbøn, í morgin kl. 11 morgunmøti, kl. 18 kvøldmøti. Mánadagin kl. 20 bønarskúlin.

Samkoman Immanuel
Sunnudagin kl. 13 sunnudagsskúli, kl. 17 møti

»Tíð til Gud«
verður í Pálsstovu í Havn sunnukvøldið 22. okt. kl. 21.00. Evnið: Sálmur 139. Høgni Johannesen og Jógvan Skýlindal skipa fyri.

Rhema á Hálsi
Fríggjakvøldið kl. 18-19 A.T.A.P. (Barnaklubbi).
Leygarkvøldið kl. 20 ungdómsmøti.
Sunnudagin kl. 17 møti og sunnudagsskúli.
Morgunbøn mánadag til fríggjadag kl. 8.30-9.30.
Øll eru vælkomin.

Meinigheitshúsið í Havn
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Tom Skaale. Barnaansing er hvørt sunnukvøld, meðan møtið er.
Mánakvøldið er LU-arbeiði kl. 19, opið kvøld.
Kl. 19.55 venur Manskórið.
Týskvøldið verður bíbliutími kl. 20, Dánjal kap. 2, v. 24-49.
Mikukvøldið venur Meinigheitskórið kl. 19.
Hóskvøldið verður ungdómsmøti kl. 20.

KFUM og KFUK í Havn
Mánadagin kl. 15 í KFUM: Eldrasamkoman, Heini Olsen sigur frá um gamlar bygdagøtur.
Týsdagin kl. 17 í KFUK: Várgleði fyri børn.

Frelsunarherurin í Havn
Fríggjadagin kl. 20.30 ung-dómsklubbur.
Sunnudagin kl. 11 møti, major Tjåland talar, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn, kl. 18 møti. Øll samkoman syngur.
Mánadagin kl. 17 skótar.

Meinigheitin í Hoyvík
Sunnudagin kl. 14 í Hoyvíkar skúla sunnudagsskúli, kl. 17.30 bøn og kl. 18 møti har Jens Lisberg saman við øðrum luttekur.
Mánakvøldið kl. 20 bønarmøti hjá Jórun og Eiriki Skála, Argjavegur 21.
Øll eru væl-komin.

Aglow, Tórshavn
Fundur verður í hølunum hjá Frelsunarherinum leygarkvøldið kl. 19.30 allar kvinnur eru vælkomnar.

Missiónsvika á Langasandi
Møti verður í skúlanum leygarkvøldið 21. okt. kl. 20 og sunnukvøldið 22. kl. 19. Talarar: Niklas Mikkelsen og Petur Magnusson.

Saron, Vestmanna
Sunnudagin kl. 11 morgunmøti.
Mánadagin kl. 20 bøn-armøti.

Missiónshúsið í Æðuvík
Vikuskiftimøti leygarkvøldið kl. 20 og sunnukvøldið kl. 18 við Sigfred Johannesen og Kajberg Davidsen. Sangluttøka úr Tjørnuvík og Kollafirði. Verið hjartaliga vælkomin.

Funningur
Fyrilestur um Hans Adolf Brorson, biskup og sálmaskald, verður í skúlanum sunnukvøldið kl. 19.
Nakrir av sálmum hansara verða sungnir.

Bíbliuskeiðsrøðin
yvir evni »Hin sanni lærusveinurin« verður hildin í arbeiðarafelagnum Hæddini í Saltangará. Møtiskeiðrøðin heldur áfram hvønn leygardag kl. 19.00. Stigtakari og bíbillærari er David Bech.

Missións- og Ungdómshúsið á Glyvrum
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 19 møti.
Innsavnan til ytrimissión.
Øll eru vælkomin.

Filadelfia, Sundalagi
Í morgin kl. 18 møti í Hósvík við Sam Jakobsen.

Ørkin, Saltangará
Møti verður sunnudagin kl. 17 í Arbeiðarafelagshúsinum Hæddini í Saltangará.
Týsdagin kl. 20 húsmøti hjá Maibritt og Trúgva Berg, Søldafirði.
Hósdagin kl. 20 bønarmøti.
Verið hjartaliga vælkomin.

Keldan, Skálafirði
Fríggjakvøldið kl. 20.30 vón fyri framman við hugna, vitnisburði og sangi. Jónhilda og Gullak Hansen luttaka.
Leygardagin kl. 21 opið hús.
Sunnudagin kl. 17 møti við Jan Jacobsen. Tú ert vælkomin í Kelduna.

Kirkjan, Norðskála
Eingin sunnudagsskúli verður sunnudagin, vegna familjugudstænastu kl. 12.00.

KFUM & K, Klaksvík
Mánadagin kl. 19.30 talar Uni Næs, Streingjakórið í KFUM & K syngur.

Betania, Skopun
Vikuskiftismøti við Agnar Vestli.
Fríggjadagin kl. 20.
Leygardagin kl. 20.
Sunnudagin kl. 10.15 sunnudagsskúli, kl. 11 morgunmøti, kl. 18 kvøldmøti. Øll eru vælkomin.

Missiónshúsið á Tvøroyri
Sunnudagin verður sunnudagsskúli kl. 14, kl. 18 møti við Eingrím og Eddie. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Sion, Vágur
Morgunmøti sunnudagin kl. 11, næmingar úr bíbilskúlanum World Horizon luttaka, kl. 18 møti.
Telefonandakt: tlf. 373777.

World Horizon bíbilskúli
Næmingar úr bíbilskúlanum World Horizon luttaka á møti í Ranhøll í Sandvík í dag kl. 17 og á morgunmøti í Sion í Vági sunnumorgunin kl. 11. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Betel, Vágur
Sunnudagin kl. 11 breyðbróting, kl. 13.30 sunnudagsskúli, kl. 18 evangel. fundur.
Mánadagin kl. 20 bønarfundur.
Týsdagin kl. 20 ungdómsfundur.
Ónsdagin kl. 20 uppbygg. fundur.

Frelsunarherurin í Vági
Leygarkvøldið kl. 20 bøn og lovsangur.
Sunnudagin kl. 14 sunnudagsskúli, kl. 18 møti við Magnus os Sámal.
Mánakvøldið kl. 20 heimaforbundið.

1000-ára haldið
Leygardagin 21. okt. kl. 10.30 verður kirkjukonsert (matiné) í Havnar kirkju, Petra Iversen syngur, Stamen Stantchev, piano og Edvard Nyholm Debess, kontrabass spæla sálmar.

Frá Felagnum Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánaði kl. 14.00 í Jákupsstovu, J. Patursonargøta 24, 100 Tórshavn. Nærri fæst at vita hjá Annvør Nielsen tlf. 317261, Helle Johansen tlf. 317940 ella Sólgerð FOldbo tlf. 422184.

Reyði Krossur Føroya
Sorgarlinjan svarar mánadag, mikudag og fríggjadag kl. 19-21.00 á tlf. 212380.

Tilhaldið í Tórsgøtu 21
Opið er mánadag kl. 10-18. Týsdag-fríggjadag 10-17. Drekkamunnur er at fáa hvønn dag eins og bløðini eru til taks.
Mánadagur 23.10.
kl. 10-18 Vit hugsa um jólini
kl. 14-18 Kortspæl, telving og onnur spøl. Tilm. til døgurðan mikud.
Týsdagur 24.10.
kl. 10-12 Vit baka
kl. 15 Prát um hvussu handilsvindeyguni vóru pyntaði til jóla í 1920'unum.
Mikudagur 25.10.
kl. 10-13 Matgerð. Anne Grethe Harlou
kl. 12 Døgurði
kl. 14 Túrur
Hósdagur 26.10.
kl. 10.30-11 Fimleikur, Sonja Danielsen
kl. 14-17 Teldupurát
Fríggjadagur 27.10.
kl. 10-17 Opið hús
kl. 15 Vit syngja.

Tað er altíð ein krókur í Tilhaldinum - um tygum ikki fáast við nakað ítriv. Vit ynskja at øll skulu kenna seg vælkomin.

Vágs Matmøðrafelag
Dagtilhaldið í Vági er opið týsdag og tórsdag frá kl. 15-18. Øll eru hjartaliga vælkomin.

Felagið Tórshavn gongutúrur
Leygardagin 21. oktober verður spákingartúrur í Havnini: Brekkur í Havn. Byrjað verður av Kunningarstovuni kl. 15.

VBA-fundir
Fundur fyri vaksin børn hjá alkoholikarum/ella ørkyml-andi familjuviðurskiftum, eru hvørt leygarkvøld kl. 20 og sunnudag kl. 17 (opin fundur).
Fundirnir eru á Vaskarínum, Tórsgøta 5.

AA-fundir í Havn
Reinsaríið, Tórsgøta 5: Leygardagin: kl. 17-18.
Sunnudagin: kl. 11-12 og evnisfundur kl. 20-21.30.

LISA
skrivstovan hjá Listafólkasambandi Føroya í Dj. í Geils-gøtu 1 er opin hvønn hósdag frá kl. 14.00 til 20.00 og annars eftir avtalu á telefon 320197. Teldu-post-ur lisa@lisa.fo – heima-síða www.lisa.fo

Kvinnuhúsið
svarar alt samdøgrið á tlf. 317200
Skrivstovan er opin frá kl. 10 til 17, og hósdagar til kl. 21. Ráðgevingin er hóskvøld eftir avtalu.

Amnesty International Føroya deild
Tinghúsvegur 18, 4. hædd
Skrivstovan er opin: Mánadag, mikudag og fríggjadag frá kl. 13–17.
Frá Felagnum

Pinkubarnadeyði
Vit hittast 2. leygardag í hvørjum mánaði kl. 14.00 í Jákupsstovu, J. Patursonargøta 24, 100 Tórshavn. Nærri fæst at vita hjá Annvør Nielsen tlf. 317261, Helle Johansen tlf. 317940 ella Sólgerð Foldbo tlf. 422184.

Føroyskir fiskimenn uttanlands
tlf. 21 04 95.
Felagið fyri føroyskar fiski-menn í Canada, Svøriki, Danmark, Íslandi og Nor-egi. Lima-gjald 200 kr. um árið. Postgiro 57894. Fø. Sparikassi 442027-8.

Bahá'í Miðstøðin í Gundadali
er opin hvørt mikukvøld kl. 20.00.
1., 2., 4. og 5. hvørt mikukvøld: drekkamuður, óformelt orðaskifti og upplýsing um Bahá'í.
3. hvørt mikukvøld: bønarmøti og drekkamuður aftaná.
Bahá'í-samfelagið í Tórshavn

Felagið Føroyar-Kuba
P. O. Box 2055, 165 Argir.
Tlf./fax 312098
Teldupostur: far_cuba@hotmail.com
Viðtala eftir avtalu.

Føroya Astma/Allergifelag
Postadressa MBF-húsið, Ís-landsvegur 10c.
Felagið hevur Tlf./fax 311419.

Føroya Felag Móti Krabbameini
Ráðgevingarstovan er opin mánadag til fríggjadag, við telefontíð frá kl. 13-15.
Tlf. 31 79 59, telefax 31 57 27.
E-mail: ffk@post.olivant.fo

Epileptikarafelag Føroya
Postadr.: MBF-húsið, Íslandsvegur 10 C. Felagið hevur ikki fasta skrivstovu-tíð, men samband við felagið fæst á tlf. 313978, Rand-fríð Sørensen, ella tlf. 319793, Mari Johannesen.

MBF
MBF-skrivstovan fer í summarfrí tann 17. juli fram til mánadagin 21. august.

Deyvafelag Føroya
Skrivstovan er opin mánadag til hósdag frá kl. 8.30 til kl. 15.30. Tlf. 31.7597, skrivitlf. 31.6929 fax 31.3609 og teldupost-adr. deaf_fo@-post.-olivant.fo

Nærvarpið LUMI radio í Ålborg
Føroyska sendingin »v/Be-tesdabrunnin« er at hoyra á FM 92,2 MHZ miðbýurin, FM 106,5 MHZ Aalborg suður, og FM 107,4 Aalborg norður, hvønn leygardag kl. 10.

Evangeliska Røddin
Odense. Føroyska sending-in frá Odense Radio hoyrist hvønn mikudag kl. 16.40, danska tíð, á FM 107,1 MHz.

Føroyska nærvarpið í Esbjerg
Føroyska sendingin »v/Betesdabrunnin« er at hoyra á FM 93,5 MHZ hvønn leygardag kl. 11.00 og verður endursend kl. 16.00.

Føroysk møti
Føroysk møti eru triðja leygardag í hvørjum mánaði kl. 19 í hølunum hjá Bethania kirkjuni á Dag Hammerskjølds Gade 2. Drekkamuður er aft-aná, øll eru hjartaliga væl-komin.

Føroyska arbeiðið í Eliaskirkjuni
Møti er hvørt leygarkvøld kl. 19 í Eliaskirkjuni á Vest-erbro Torv, Vesterbrogade 49.
Inngongd undir stóru trappuni. 5 min. at ganga frá Hovedbanegården, 2 min. frá Føroyahúsinum.
Bussarnir 1, 6, 14, 16, 28 og 550S steðga nærhendis. Øll eru vælkomin.
Nærri fæst at vita frá Atla Ras-mussen, tlf. 32 969995, ella Øssuri Kjølbro, tlf. 36 77 38 20.

Føroysku gudstænasturnar
í Samuelskirkjuni, Thorsgade 65, 2200 København NV, eru hvønn 1. og 3. sunnudag í mánaðinum kl. 14.00.
(Kirkjan er skamt frá Nørrebros Runddel). Prestur-in er at hitta á tlf. 38796146.

Kristnastova
Birmavej 36, København S, tlf. 32 55 18 09
fax. 32 58 61 49
e-mail: kristnastova@get2net.dk
Kristiligur fundur er hvørt fríggjakvøld kl. 20.
Møti við breyðbróting er hvønn sunnu-morgun kl. 11. Sunnudagsskúli er sam-stundis.
Bussarnir 5, 9, 12, 13, 37, 38 steðga nærhendis.

BRÚDLEYP

Mikudagin 18. okt. giftust í Havn Maiken Holm Erlingsson og Andrass Olsen.

Leygardagin 18. november giftast Noomi Marsten, Klaksvík og Karl Gregersen, Gøta. Vígslan verður í Filadelfia í Gøtu kl. 14.00.
Veitslan verður á Hotel Føroyum kl. 19.00, og tey sum vilja gleða okkum við at koma verða biðin um at siga frá á tlf. 441422 og 455777 innan mánadagin 6. nov.

25. nov. giftast í dómkirkjuni kl. 16.00 Heri Thomsen, Nólsoy og Lenina Nena Andreasen, Húsavík. Vælkomst verður í HB-húsinum kl. 19.00.
Tey, sum vilja gleða okkum við at koma í brúdleyp, verða biðin um at siga frá innan 9. nov. á tlf. 319318, 361780, 327020.

Leygardagin 16.12. giftast í Vágs kirkju Anja Mørk og Tom Villy Magnussen, Vágur, Eyðhild Mørk, Vágur og Suni Poulsen, Sumba, Heidi Mørk og André Joensen, Vágur. Vælkomst verður í Vágs høll kl. 19.00.
Tey, ið vilja gleða brúðarpørini við at koma, verða vinarliga biðin um at siga frá áðrenn 15.11. á tlf. 373929, 373175, 373193 og 373277.

Gullbrúdleyp

Leygardagin 21. oktober hava hjúnini Judith og Osvald Kjærbo, Tórshavn, gullbrúdleyp.
Vælkomst verður í Ebenezer kl. 18.00.

Krúndiamantbrúdleyp

Sunnudagin 22. okt. kunnu Nanna og Axel Olsen á Toftum halda krúndiamantbrúdleyp. Hend dag eru tey hjá dóttrini í Saltnesi, har høvið er at heilsa uppá krúndiamantparið frá kl.15 til 18.

103 ár

Í dag, 21. okt. verður Margretha Bendtsen, fødd Øregaard, 103 ár.
Hon er ættað av Mýruni í Leirvík, dóttir Fuglfjarðar-Jákup og Maluna. Gretha fór sum ung til Keypmannahavnar og hevur búð niðri síðani.

Læknavaktir

Tórshavn:
Læknavaktin tlf. 310033

Eysturoy:
Leygardagin 21. okt.: Magnus á Stongum, tlf. 423006
Sunnudagin 22. okt.: Kári Rasmussen, tlf. 447010

Norðoyggjar:
Leygardagin 21. og sunnudagin 22. okt.:
Magnus Magnussen, tlf. 455451

Vágar: tlf. 332413

Suðuroy (norður): tlf. 371560
Suðuroy (suður): tlf. 373030

Tannlæknavakt, Tórshavn
Bráðfeingishjálp fæst leygardag, sunnudag og halgidagar kl. 13-14. Tlf. 314544.

Føðingar

7. okt. fingu Anja Eyðunsson og Heini Thorsteinsson, Vágur, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4400 gr.

11. okt. fingu Elsebeth og Ludvík Lydersen, Viðareiði, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3900 gr.

13. okt. fingu Jensa og Claus Højgaard, Runavík, ein son. Hann var 56 cm. langur og vigaði 4150 gr.

14. okt. fingu Astrid Magnussen, Fuglafjørður og Jan Suni Hansen, Kvívík, eina dóttur. Hon var 51 cm. long og vigaði 3400 gr.

14. okt. fingu Sólrun Durhuus og Eyðfinn Pet-ersen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3095 gr.

16. okt. fingu Elisa Simonsen og Jan Venned, Klaksvík, ein son. Hann var 51 cm. langur og vigaði 4200 gr.

16. okt. fingu Hanne Østergaard Christensen og Eyðfinn Heinesen, Rønde, eina dóttur. Hon var 54 cm. long og vigaði 4800 gr.

16. okt. fingu Heidi og Hans Erik Jakobsen, Klaksvík, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3600 gr.

16. okt. fingu Helena og Erik Melchior Hansen, Sørvágur, eina dóttur. Hon var 55 cm. long og vigaði 3750 gr.

16. okt. fingu Joan og Kristin Michelsen, Froðba, eina dóttur. Hon var 52 cm. long og vigaði 3890 gr.

17. okt. fingu Anna og Oystein Petersen, Tórshavn, ein son. Hann var 54 cm. langur og vigaði 4100 gr.

17. okt. fingu Maria Svabo Hansen og Kári Hansen, Tórshavn, eina dóttur. Hon var 53 cm. long og vigaði 3550 gr.

18. okt. fingu Marin Sigvardsen og Allan Magnussen, Saltangará, ein son. Hann var 52 cm. langur og vigaði 3900 gr.

19. okt. fingu Anja Højgaard og Robson de franca, Norðagøta, ein son. Hann var 53 cm. langur og vigaði 3400 gr.

19. okt. fingu Bergun Kass og Petur Joensen, Hoyvík, eina dóttur. Hon var 56 cm. long og vigaði 4700 gr.

Eitt ljós á gøtu míni

Og Jesus tók til orða og segði við hann: »Símun, eg havi nakað at siga tær. Men hann sigur: »Meistari, sig tað!

Luk. 7, v. 40

Við hesum orðum avdúkar Jesus Símun og hansara kávalæti. Men hann ger tað kortini við tí endamáli at kunna sleppa til við fyrigevingini og kærleikanum.

Hjá kvinnuni avdúkaði syndin seg sjálv. Slík synd, sum hennara er ongantíð tann torførasta og vandamiklasta at hava við at gera, hóast tað eru slíkar syndir, mest verður talað um mest verður gjørt burturúr. Men at avdúka okkara syndafulla hjarta, so vit veruliga skilja okkara glataðu støðu, og hvussu nógv vit sjálvi hava brúk fyri einum frelsara, er ikki altíð líka lætt. Tað kann bara ein einasti gera, Jesus jálvur gjøgnum sítt orð og við Guds Anda.

Tað var hent hesi kvinnuni. Hon varð møtt av Jesusi við fyrigeving og kærleika. Einum kærleiki og ein fyrigeving, sum kur bæði syndina og syndaran í so stórum álvara, at hann sjálvur hevur borið fylgjurnar av hesum. Hetta fekk eisini kærleikan til Jesus at vella fram, soleiðis sum hann kom til sjóndar í hennara gerð.

»Símun, eg havi nakað at siga tær!« Vit kunnu skifta út navnið á tí tiltalaða við okkara egna. Tí í dag eru tað okkum, Jesus fegin vil hava sagt nakað. Hann vil avdúka okkara synd, fyri at vit kunnu læra at síggja, at eisini vit hava Hann sum frelsara fyri neyðini!

Fyrigeving syndanna í Jesusi Kristi, tað er Guds náði go kærleiki til okkara. Har hesin kærleikin sleppur til, veksur takksemi fram. Og har kærleiki og takksemi finna hvønn annan, vilja lív og gleði skapast. Eitt lív og ein gleði, vit verða send út aftur í gerandisdagin við.

»Símun, eg havi nakað at siga tær!« Hvat Jesus enn hevur at siga okkum, so er tað orðið um fyrigeving syndanna, hann fram um alt vil siga okkum. Tað orð, sum goymir lív og sælu í sær. í einum føri kunnu vit lata Símun vera fyrimynd fyri okkum. Í hansar asvari til Jesus: »Meistari, siga tað«. Sæl eru vit, um vit gera tað og geva Jesu orðum gætur.

Jónsvein Bech

Hugmóðs tankar út mær rek,
Vís mær gløgt mítt egið brek;
Fals og øvund, hatska trá,
Kæri faðir halt mær frá. (Sb. 305, 4)

Andlát

04. oktober:
Ingibjørg Mørk Eysturoy, ættað úr Havn, búsitandi í Íslandi, 79 ár
05. oktober:
John Nybo, Valby, ættaður av Viðareiði, 79 ár
06. oktober:
Anna Elisabeth Djurhuus, Porkeri, vanliga nevnd Betta, 79 ár
11. oktober:
Kristianna Petersen, Selatrað, vanliga nevnd Nanna
12. oktober:
Andreas Lava Olsen, Glyvrar, 68 ár
13. oktober:
Pól Esmar Thomsen, Strendur, 82 ár
Anfinn Magnus Poulsen, Tórshavn, 45 ár
14. oktober:
Poul av Kák Poulsen, 81 ár
Karhild Gaardlykke, Nes, 40 ár
15. oktober:
Henning Hjelm, Vágur, 75 ár
Lena Mortensen, Argir, 88 ár
16. oktober:
Solberg Fornagarð, ættaður úr Fuglafirði, 78 ár
Franxiska Poulsen, vanliga nevnd Ziska, økonoma í Værløse, ættað úr Miðvági, 89 ár